Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Undirskrift formansins: _____

Ár 2011, hin 25. januar kl. 17.30 hevði Klaksvíkar Býráð fund, har hesir limir møttu:
Gunvá við Keldu, Jógvan Skorheim, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Óli M. Lassen, Atli S. Justinussen, Auðunn Konráðsson, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð, Eyðgunn J. Samuelsen og Jákup F. N. Mikkelsen.

2011/001.
10/00636 Vegateinur úr Ánavegnum navngevast

Íbúgvi ger í skrivi móttikið 12. august 2010 vart við sína ónøgd um, at hús hansara nú eru adressuskrásett til Ánaveg. Hann vísir á, at hann øll tey 26 árini, hann hevur búð í húsunum, hevur lýst sín bústað at vera ”á Grønaból”, sum er gamalt staðarnavn fyri umrødda økið.

Gøtunavnanevndin tekur á fundi 7. desember 2010 undir við, at vegateinurin niðanúr Ánavegnum fær navnið “á Grønaból”.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 11. januar 2011 undir við Gøtunavnanevndini, 6. januar 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/002.
10/01006 Sløkkiliðið – ynski um keyp í desember 2010 – *2. viðgerð*

Frágreiðing til býráðsfund 14. desember 2010:
Ein uppgerð eftir rudding av oljudálking vísir, at Sløkkiliðið fer at hava umleið 1 mió. kr. í avlopi. Sløkkiliðsleiðarin vísir á ein íløgutørv áljóðandi kr. 800.000,- Sí skriv í málinum.
Brunanevndin tekur á fundi 23. november 2010 undir við uppskotinum hjá sløkkiliðsleiðaranum vísandi til ov lítla játtan í rakstri og manglandi íløgujáttan ígjøgnum fleiri ár.
Tekniska Nevnd mælir á fundi 30. november 2010 til at játta kr. 600.000,-. Elsebeth M. Gunnleygsdóttur luttók ikki í viðgerðini av málinum, vegna ógegni.
Fíggjarnevndin tekur á fundi 8. desember 2010 undir við Brunanevndini, 23. november 2010 og Teknisku Nevnd, 30. november 2010, og at málið verður framt, tá ið peningurin er innkomin.

Málið varð soleiðis samtykt fyrru ferð á býráðsfundinum 14. desember 2010.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 19. januar 2011 undir við býráðssamtyktini 14. desember 2010 og beinir málið í býráðið til seinnu viðgerð við tilmæli um samtykt.

Býráðsins samtykt:
Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, býráðslimur, luttók ikki í viðgerðini av hesum máli, vegna ógegni.
Tilmælið samtykt.

Fundurin lokin kl. 17.40

_____
(undirskrift skrivarans)

Gunvá við Keldu,borgarstjóri	*Jógvan Skorheim*
Elsebeth M. Gunnleygsdóttur	*Óli M. Lassen*
Atli S. Justinussen	*Auðunn Konráðsson*
Steinbjørn O. Jacobsen	*Eyðgunn J. Samuelsen*
Óluva Klettskarð	*Jákup F. N. Mikkelsen*